




SUMMAR FESTIVALUR '04

Fyrireikararnir:

# Ein flúgvandi byrjan

**Mánamorgun var gerandisdagur aftur í Klaksvík eftir eitt vikuskiftið, har nærum allur býurin gekk í ekstasu, tí tað størsta tónleikatiltakið nakrantíð eydnaðist so væl. Steintór Rasmussen var farin til arbeiðis, men hann setti tó stundir av til eitt lítið prát nú uppruddingararbeiðið stendur fyri framman**



*Steintór Rasmussen ikki bara var ein av fyrireikarunum til Summarfestivalin 2004. Hann framførdi eisini á palli saman við Frændum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

SUMMAR FESTIVALUR 04
*Solby A. Eliasen, solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** – Summarfestivalurin fekk eina flúgvandi byrjan, og vit eru allir framúr vælnøgdir, sigur ein fegin, men nakað troyttur Steintór Rasmussen.

Hann sigur, at teir ikki høvdu torað at vóna, at undirtøkan fór at verða so stór. Men so viðgongur hann kortini, at beint upp undir festivalin, tá veðrið var so gott, og hýrurin lat til at vera stak góður allastaðni, at so fóru tankarnir at sníkja seg fram um, at hetta væl kundi fara at verða heilt stórt.

– Eg veit tað ikki við vissu, men eg meti, at hetta helst er ein tann størsta mannamúgvan savnað á einum staði í norðoyggjum, sigur Steintór.

### Hongur saman

Uttan at hava gjørt festivalin ordiliga upp, torir Steintór tó at siga, at tað hongur saman fíggjarliga.

– Hetta skal ikki skiljast, sum at festivalurin er ríkur, men nú kunnu vit gjalda tað, sum vit skulu og møguliga fara at hyggja okkum um eftir onkrum øðrum stórum nøvnum at fáa hendanvegin til komandi ár, sigur samskiparin av festivalinum.

Hervið hevur Steintór longu gjørt vart við, at fyrireikararnir eru áhugaðir í at skipa fyri Summarfestivalinum aftur komandi summar.

– Vit hava tosað eitt sindur aftur og fram, og tað letur avgjørt til, at hugurin er tilstaðar, greiðir Steintór frá.

Hann væntar eisini, at tað verður munandi lættari at fara í holt við at skipa fyri einum slíkum tiltaki aftur.

– Nú er tað staðfest, at tað ber til at taka eitt so stórt felagstak í Klaksvík. Og eg vil leggja dent á, at øll hava lyft hesum í felag. Øll sum hava bakkað hesum tiltakinum upp takka vit, sigur Steintór Rasmussen.

### Koyrdi væl

Steintór stóð sjálvur á palli eina løtu saman við Frændum leygarkvøldið, og tað sær hann sum ta einastu stressandi løtuna hjá sær sjálvum. Eftir framførsluna slappaði hann fullkomuliga av og fekk notið allar hinar fantastisku framførslurnar.

– Tað var stuttligt at síggja alla mannfjøldina, men so sanniliga eisini stuttligt at ganga út millum fólkið og merkja hýrin, sigur Steintór at enda.

Steintór Rasmussen fekk eisini eitt væluppiborið herðaklapp frá borgarstjóranum, Steinbjørn Jacobsen, tá hann setti festivalin.

– Góði Steintór, enn einaferð er tað eydnast tær – saman við øðrum góðum kreftum – at slóða inn á áður ótráddar leiðir her í Klaksvík. Slíkt krevur hugflog og ikki minst ein óbendandi vilja, segði borgarstjórin millum annað í røðu sínari, áðrenn hann handaði Steintóri eitt blómutyssi.

# Nærum 7.000 fólk um fjørðin

**Heilt nógv fólk aðrastaðnis frá fóru til Klaksvíkar á Summarfestival. Hetta hevði sum vera man sína ávirkan á flutningin um Leirvíksfjørð. Dúgvan flutti tilsamans knapt 7.000 fólk aftur og fram um vikuskiftið**

SUMMAR FESTIVALUR 04
*Solby A. Eliasen, solby@sosialurin.fo*

Klaksvíkingar kenna væl til rokilsi við ferjuleguna. Men fyri eina ferð skuld var ikki líka rokaligt í Klaksvík fríggja og leygardagin, sum í Leirvík. Ein javnur streymur av bilum var til Leirvíkar báðar dagarnar, og hetta sást eisini aftur í tølunum á fólki, sum Dúgvan flutti um fjørðin um vikuskiftið.

Rættuliga mong tóku ta skilagóðu avgerð at lata bilin standa eftir í Leirvík, tí ella hevði verið eitt verri skil.

Leygardagin stóðu bilar parkeraðir allastaðni við ferjuleguna, eftir vegnum frá ferjuleguni og við Statoilstøðina.

Umborð á Dúgvuni verður tó sagt, at sum heild gekk alt upp á stás. Ferjan sigldi fleiri eykatúrar um vikuskiftið. Aftaná konsertina leygarkvøldið skuldi Dúgvan fara klokkan eitt korter yvir eitt, men longu klokkan fimm minuttir í eitt loystu teir, tí skipið var fult. Tá hon kom aftur til Klaksvíkar eftir tann túrin, sigldi hon ein túr afturat, so at tey, sum stóðu eftir fyrra túrin kortini sluppu yvir aftur á meginlandið.

Sunnukvøldið var eisini nógv ferðsla um fjørðin, um enn ikki so nógv sum leygardagin. Men hetta vikuskiftið man hava verið eitt av teimum mest upptiknu hjá Dúgvuni, og túratalið var munandi hægri enn vanligt.



*Bilar stóðu parkeraðir alla staðni í Leirvík, meðan festivalgestir hugnaðu sær í Klaksvík allan leygardagin*
*Mynd: Leif Eliasen*